## Vodka til kvinnur

Russiska vodkabryggjaríið Igor Volodin hevur nú gjørt eitt serligt slag av vodka, sum er ætlað kvinnum. Russiskir fjølmiðlar skriva, at tann nýggi drykkurin er royndur í seinastuni og fer eina rættiliga sigursgongd kring landið. Drykkurin hevur sambært framleiðaranum tann góða eginleika, at hann elvir ikki til timburmenn. Umleið 2,5 mió. russar hava trupulleikar við rúsdrekka, men mong halda, at tað veruliga talið er nógv størri.



## Ávirkaði ikki prísin

Tøl hjá íslendsku løgregluni benda á, at tað fekk ikki stórvegis ávirkan á prísin á rúsevnum í Íslandi, at myndugleikarnir avdúkaðu ta stóru smuglararoyndina á Fáskrúðsfirði í fjør. Tá steðgaðu myndugleikarnir eitt nú 23 kilo av amfetamini og 14 kilo av ecstasy. Men sambært løgregluni kostar amfetamin heldur minni í Íslandi nú enn í fjør, og ein ecstasy kostar lítið meiri. Okkurt bendir á, at kokain er komið ístaðin fyri amfetamin, sigur løgreglan.

# Einki nýtt um hjólið

**Málið um avdotna nasahjólið er ikki nærri einum svari í dag, enn tað var í gjár, og Magni Arge, stjóri, hevur ikki so nógv at leggja aftrat tí, sum longu er sagt**

ÓHAPP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var eitt brotið leigi, ið var orsøkin til, at eitt flogfar hjá Atlantic Airways í gjáramorgunin misti annað nasahjólið.

Tað er fyribils niðurstøðan av kanningunum, sum flogfelagið ger. Magni Arge, stjóri, sigur, at teir nú gjøgnumganga allar mannagongdir og skipanir hjá felagnum.

- Vit fara at gera status seinni í dag, men kanningarnar verða sjálvandi ikki lidnar í dag. Men vit skulu kanna, um vit kundu havt fangað óhappið við nasahjólinum framman undan, og í heila tikið gjøgnumganga allar skipanir, sigur Magni Arge.

Stjórin í Atlantic Airways hevur verið frammi fleiri ferðir síðani óhappið, bæði í Kringvarpinum og á Portalinum. Sambært honum var ongantíð vandi á ferð hjá flogfari og fólki, og tað er heldur eingin bági at lenda, sjálvt um annað sanahjólið vantar.

Eingin – heldur ikki flogskipararnir – varnaðust, at flogfarið hevði mist annað nasahjólið. Hinvegin skapti tað nakað av órógvi í Kastrup, tá hjólið varð funnið á taxabreytini. Men áðrenn boð vórðu fingin upp til Vágar, var flogfarið lent í øllum góðum.



*Frágreiðingin um brotnaða nasahjólið bendir á, at eitt brotið leigi var orsøkin*

# Heini nýggjur nevndarformaður

**Føroya Tele hevur fingið nýggjan nevndarformann, eftir at Hákun Steingrímsson gjørdist stjóri í formula.fo. Nýggi nevndarformaðurin er Heini Zachariasen, sum er ein av trimum høvuðseigarum í KT-fyritøkuni Bullguard**

NEVNDARFORMAÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Heini Zachariasen er nýggjur nevndarformaður í Føroya Tele*

Tað er ein av tungu dreingjunum innan KT-vinnuna, sum nú situr sum nýggjur nevndarformaður í Føroya Tele.

Saman við tveimum øðrum eigur hann KT-fyritøkuna Bullguard, sum er serfrøðingur innan verju av virus. Fyritøkan hevur deildir í Stórabretlandi og Rumenia, umframt deildina í Danmark.

Heini segði við Rás2 mikudagin, at hann ikki enn hevur sett sær nøkur greið mál, og at hann fyrst ætlar sær at tosa við landsstýriskvinnuna.

- Ferðin á internetinum og prísurin eru sentralir partar, og Føroya Tele er sentralur liður í menningini innan KT-vinnuna, sigur Heini Zachariasen.

Hann leggur dent á, at tað er ógvuliga umráðandi, at øll fáa atgongd til breiðband.

- Tá vit fyrst komu til Rumenia sóu vit, at talan var um dugnalig og intellegent fólk, men tey kundu ikki kappast, tí tey vóru ikki á marknaðinum. Øll skulu vera on-line alla tíðina fyri at kunna kappast á marknaðinum, sigur Heini Zachariasen.

Hann vísir á, at Føroyar hava fleiri vansar at dragast við. Ferðin á internetinum er ov lág, prísurin ov høgur, og hartil kemur so tann veruleiki, at Føroyar liggja mitt úti í Atlantshavi, og at tað ikki altíð er líka lætt at sleppa til og úr Føroyum.

- Men glottar eru. Nýggir káplar koma, og Føroyar eru nú um at koma upp móti sama støði sum londini uttan um okkum, og her skal Føroya Tele ganga undan, sigur Heini Zachariasen.

Hóast hann er spildurnýggjur í starvinum, hevur hann kortini gjørt sær sínar metingar.

- Eg havi sjálvandi mínar raðfestingar, men tað er meiri týdningarmikið, hvat landsstýrið og landsstýriskvinnan ætla. Tá tey hava valt ein føroying uttanlands í hetta starvið, so má tað vera tí, at tey hava ambitiónir úteftir, sigur Heini Zachariasen, sum er glaður og stoltur um avbjóðingina, og ætlar sær at prógva nøkur ting sum nevndarformaður.